# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801




# Súni er Føroyameistari í Go Kart

**Súni Egholm frá Mouritsens Bussum vann Føroyameistara-kappingina í Go Kart fyri virkir**

Finalan í Føroyameistara-kappingini í Go Kart fyri virkir var leygardagin 27. juni. Talan var um kappingina Føroya Tele Cup, sum var á parkeringsøkinum hjá Føroya Tele í Hoyvík. Kappingin byrjaði vikuskiftið 20.-21. juni og endaði leygardagin 27. juni.

Vinnari gjørdist Súni Egholm frá Mouritsens Bussum, nr. 2 varð Erling Dalsgaard frá felagnum DÍGJ og nr. 3 varð Heini Guttesen frá Autoservice.

Ferðasteyp varð latið til vinnandi fyritøkuna. Steypið kann einans ognast eftir at sama fyritøka hevur vunnið føroymeistaraheitið 3 ár á rað ella 5 ár samanlagt.

Kappingin varð skipað við einum innleiðandi umfari og síðan eini kapping um meistaraheitið.

Tað var motorsúkkluhandilin AD-Import í Havn, sum skipaði fyri kappingini. Sponsorar vóru Føroya Tele, Televarpið og Pizza 67.

Agnar Dahl frá AD-Import sigur, at kappingin fekk góða undirtøku, tilsamans vóru 120 luttakarar frá umleið 20 fyritøkum.

**mg**



*Finalan í Føroyameistara-kappingini í Go Kart fyri virkir var leygardagin 27. juni*



*Súni Egholm frá Mouritsens Bussum vann Føroyameistarakappingina í Go Kart*



*F.v. Erling Dalsgaard, Súni Egholm og Heini Guttesen*



*Føroya Tele Cup var á parkeringsøkinum hjá Føroya Tele í Hoyvík*



**BMW 318 TDS til sølu**

Ein svartur BMW 318 TDS (diesel) er til sølu fyri 40.000 krónur.

Bilurin er skrásettur fyrstu ferð hin 11. juni 1996 og er í góðum standi

**Áhugaði ringið tel: 223369**